# Ein kensluborin spurningur, hvør skal manna Vesturvón

**- Vit hava eina ábyrgd yvirfyri manningini, sum var við Akrabergi, men vit kenna eisini eina ábyrgd yvirfyri teimum monnum, sum hava sítt livibreyð umborð á Vesturvón, sigur Anfinn Olsen, reiðari**

VESTURVÓN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Reiðarin og stjórin í Framherja, sum nú eigur meirilutan av partapeninginum í flakatrolaranum, Vesturvón, heldur, at spurningurin um manningarviðurskiftini er kensluborin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Reiðarin og stjórin í P/F Framherja, Anfinn Olsen, dugir í løtuni ikki siga, hvør fer at manna flakatrolaran, Vesturvón, nú felagið á Toftum hevur keypt 60% av partapeninginum í P/F Vesturvón.

- Vit hava júst selt Akraberg, og nakrir og tjúgu av manningini, sum vóru við Akrabergi, eru nú umborð á Sundabergi, sum Framherji hevur leigað frá JFK-Troli í Klaksvík.

Sundaberg í Barentshavinum og fiskar av kvotu, sum Akraberg hevði eftir har eysturi, og Vesturvón er á svartkalvaveiði í Eysturgrønlandi.

### Kensluborið

- Tað er sjálvsagt ein kensluborin spurningur, hvør fer at manna flakatrolaran, Vesturvón. Vit hava eina ábyrgd yvirfyri teimum monnum, sum vóru við Akrabergi, samstundis sum Framherji eisini kennir eina ábyrgd yvirfyri teimum, sum eru við Vesturvón í dag og hava havt sítt livibreyð umborð á hesum skipi.

Anfinn sigur, at hetta er ein spurningur, sum felagið noyðist at taka støðu til í næstum.

- Men hetta verður ikki nakar lættur spurningur at greiða, leggur hann aftrat.

### Neyvan longt

Leigumálið millum Framherja og JFK-Trol byrjaði seinast í juli og varar til endan av oktober.

- Eg vænti ikki, at leigumálið verður longt, men hetta fara eg og Hanus Hansen at tosa saman um, sigur reiðarin og stjórin í Framherja, Anfinn Olsen, at enda.

Manningin umborð á Sundabergi telir einar 35 mans, harav nakrir og tjúgu eru menn, sum hava verið við Akrabergi.

Eitt er manningarviðurskiftini; eitt annað er navnið.

Óhugsandi er ikki, at Vesturvón sum frálíður skiftir navn, og tá er nærliggjandi at hugsa sær, at navnið, Akraberg, kemur at standa á skipssíðuni.

## Dugir ikki at meta um JFK-keypið

VESTURVÓN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Anfinn Olsen sigur seg ikki duga at samanbera keypið, sum Framherji hevur gjørt við at keypa 60% av partabrøvunum í P/F Vesturvón og keypið, sum Hanus Hansen, stjóri og reiðari og Norðoya Sparikassi gjørdu, tá ið partarnir keyptu nógv umrøddu partabrøvini í JFK-Troli.

- Nei, eg dugi slett ikki at samanbera hesi keyp, hóast vinnan í stórum er hin sama, tí eg kenni ikki lánsviðurskifti og annað í fyritøkuni, JFK-Troli, sigur hann.

### Lítið tosað

Spurdur, hvussu keypið av P/F Vesturvón í veruleikanum kom í lag, sigur Anfinn, at tað var Kaupthing, sum bjóðaði Framherja at keypa partabrøvini.

- Eg kenni ikki málið í smálutum, men sum eg havi skilt, ætlaði Kaupthing at "formidla" ein handil.

- Antin hevur Kaupthing sæð eitt hugskot í hesum – ella eru tað partaeigarar, sum hava vent sær til Kaupthing, heldur Anfinn Olsen, sum sigur seg ikki hava viljað spurt, hvussu landið í hesum førinum liggur.

Stjórin og reiðarin sigur, at Framherji hevur tosað lítið við seljararnar í hesum máli.

Framherji:

# Ongar ætlanir um at selja ísfiskatrolararnar

**- Vit skulu liva av tí sum skipini geva – og ikki av tí, sum virkini geva, sigur Anfinn Olsen, stjóri í Framherja**

ÍSFISKASKIPINI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Uppi í keypinum hjá Framherja á Toftum av teimum 60% av partabrøvunum í P/F Vesturvón, eru eisini teir fýra ísfiskatrolararnir, fyrrverandi Stjørnan og Polarhav og fyrrverandi Topas og Sardis.

Anfinn Olsen, stjóri í Framherja, sigur, at felagið enn ikki hevur gjørt sær nakrar tankar um, hvussu verður við hesum skipunum – annað enn tað, at tey eru í tí vinnu, tey eru.

Spurdur, um Framherji møguliga fer at selja hesi skipini, sigur stjórin:

- Nei, tað vænti eg ikki – og ikki í fyrstu syfti í hvussu er.

### Eingin fiskaframleiðsla

Hann væntar heldur ikki, at skipini fara at landa til nakað ávíst fiskavirki, og hann leggur dent á, at Framherji ongar ætlanir hevur um at fara undir fiskaframleiðslu á landi.

- Nú veit eg ikki, um ísfiskaskipini hava verið partur av grundarlagnum undir nøkrum ávísum virki – ella nøkrum ávísum øki í landinum. Um so er – og hetta byggir á marknaðartreytir, kann saktans vera, at tað "tilknýti" fer at halda fram, sigur Anfinn.

### Marknaðartreytir

Hann vísir á, at tey sjálvsagt fara at leggja seg eftir at fáa best møguligan prís fyri veiðina, og hann væntar, at veiðan hjá skipunum sum heild verður seld á uppboðssølu.



*- Vit fara sjálvsagt at leggja okkum eftir at fáa best møguligan prís fyri veiðina hjá ísfiskaskipunum, sigur Anfinn Olsen*

- Sum felag, ið rekur skip, skulu vit liva av tí, sum skipini geva – og ikki av tí, sum virkini geva, sigur Anfinn Olsen, stjóri.